# Næminga-konsert í Ósáskúlanum



Málið hjá musikkskúlunum í Føroyum er, at øll børn skulu fáa høvi at læra at spæla á ljóðføri

Mynd: Rúna Sivertsen

**Í kvøld klokkan 19 fara næmingar úr Klaksvíkar Musikkskúla at hava konsert í Ósáskúlanum**

NÆMINGAKONSERT
*Rúna Sivertsen*
*runa@sosialurin.fo*

Á konsertini í Ósáskúlanum í kvøld fara um 40 næmingar at spæla.

Umframt strúkiorkestur og messingblásarar, verða eisini floytur, violinir og sello at hoyra.

Í musikkskúlanum í Klaksvík undirvísa 7 tónleikalærarar um 120 næmingum. Leiðari er Helga Hilmarsdóttir Gerðalíð.

Sambært eini kanning, nevnd PISA, er tónleikur mennandi fyri børn, bæði fakliga og sosialt. Í kanningini vórðu 172.000 børn úr OECD-londunum nároynd í lesing, rokning og náttúru.

Hetta kom fram á eini alttjóða ráðstevnu, Skole & Samfund, á Fjóni seinasta heyst.

Royndir her heima vísa eisini, at børn, sum hava torført við at læra ella hava trupulleikar, fara at klára seg betur og fáa størri sjálvsálit.

Niðurstøðan er, at tað er ein góð íløga at nýta pening til frálæru í tónleiki. Í hvussu er, vísa kanningar, at tá børn sleppa at spæla ljóðføri, mennast tey skjótari og læra betur.

Næmingakonsertin í Ósáskúlanum í kvøld er ein av mongu konsertunum, sum musikkskúlarnir kring landið skipa fyri.

SKRIVSTOVUHØLIR Í SALTANGARÁ



Á Heiðavegi 15 í Saltangará eru nýggj skrivstovuhølir tøk til leigu frá uml. 1. januar 2004

Talan er um 50 fermetrar á miðhæddini og 70 fermetrar ella 2x35 fermetrar á loftshæddini. Harafturat koma kopirúm, goymslurúm og toilet til hvørja skrivstovu.

Áhugað kunnu síggja hølini við at venda sær til:

**ERO P/f, tel 44 96 12**

Sosialurin 341800

## Kostvanar á Margarin-fabrikkini

KOSTUR
*Tíðindaskriv*

Í kvøld, týskvøldið, verður fyrielstur um kostvanar á Margarinfabrikkini í Havn. Í næstum fer Margarinfabrikkin at hava heilsugóðan mat at bjóða til bíligan penga.

Í kvøld, týskvøldið 9. desember kl 20 skipar Margarinfabrikkin fyri fyrilestri undir heitinum: Kostvanar hjá børnum og ungum.

Fyrilestrahaldari verður Anita Højgaard, kostráðgevi. Hon fer m.a. at geva góð kostráð til børn og ung og eisini onnur, ið ynskja at vita meira um heilsugóðan kost.

Hesin fyrilestur er ein liður í, at Margarinfabrikkin í næstum fer í gongd við eina matarskipan, ið inniber, at børnini og tey ungu, ið koma á Margarin-fabrikkina eftir skúlatíð, fáa møguleika at keypa heilsugóðan mat fyri bíligan pening.

Eftir fyrilesturin er møguleiki at royna nakrar vørur sum MBM hevur at bjóða.

Fyrilesturin er almennur og ókeypis.

Margarinfabrikkin skipar javnan fyri almennum fyrilestrum, sum viðgera viðurskifti hjá børnum og ungum.

†

Kunngjørt verður fyri ætt, vinum og kenningum, at kæri maður, faðir og abbi okkara

**Simon Andreas Sofus Joensen**
Skála,
vanliga nevndur Andrias á Syðradali

andaðist hósdagin 4. desember, 78 ára gamal.

Jarðarferðin verður úr Skála kirkju týsdagin 9. desember kl. 13.00.

*Fyri tey avvarðandi*

**Julina, Magnus, Høgni, Jóan Jákup og Ingi**

## Tøkk

Vit takka hjartaliga øllum, sum sýndu samkenslu, tá ið elskaða kona, mamma, dóttir, systir, sonarkona og svigarinna

**Anna Maria í Skorðastovu**

lá sjúk, andaðist og varð jarðað.

Somuleiðis hjartans tøkk til prestarnar, fyri troystarrík orð í kapellinum og í kirkjuni. Somuleiðis hjartans tøkk til starvsfólkið á B6 á Landssjúkrahúsinum, og til øll tykkum, ið á ymiskan hátt hjálptu til áðrenn og aftaná jarðarferðina. Tøkk fyri blómur, kransar, heilsanir og gávur og tøkk til øll tykkum, sum fylgdu henni til hennara seinasta hvíldarstað.

**Suni, Høgni og Guðrið**



# Harðsskapur uttan fyri Café Natúr

**Leygarnáttina tók ein ungur maður í eina gentu og var rættuliga harðligur við hana. Løgreglan kom á staðið og handtók mannin**

LØGREGLUTÍÐINDI
*Solby A. Eliasen*
*solby@sosialurin.fo*

Løgreglan varð boðsend til Café Natúr leygarnáttina, har ein ungur maður fór illa við fyrrverandi gentu síni. Hann tók kvørkratak um hana og sló hana somuleiðis. Løgreglan avhoyrdi vitnini, og maðurin verður skuldsettur fyri harðskap.

– At taka kvørkratak um ein annan persón, kann skjótt gerast sera vandamikið, so hetta er so avgjørt eitt harðskapsmál, sigur vakthavandi.

Eitt sindur fyrr leygarnáttina var løgreglan boðsend til Dr. Jacobsensgøtu, har tvær gentur vóru farnar til hendurs.

– Tær klandraðust um eitthvørt, og tað letur til, at øvund var orsøkin, sigur løgreglan.

Hvat øvundin snúði seg um, sigur søgan tó onki um. Genturnar vórðu tosaðar tilrættis av løgregluni, og har endaði alt gott.

Løgreglan varð eisini boðsend til eini sethús í Havn til húsaófrið. Vakthavandi sigur, at hetta gerst alsamt meira og meira vanligt. Her vóru ein maður og ein kona farin til hendurs, og ein granni boðsendi løgregluni.

Tá slíkt hendir, fer løgreglan heim til fólkini og roynir at tosa tey tilsættis. Í hesum førinum endaði tað við, at løgreglan koyrdi mannin til vinfólk, og so var aftur friður í grannalagnum.

## Harðskapur í Klaksvík

Í Klaksvík fóru tveir mans til hendurs í miðbýnum leygarnáttina. Annar varð sligin harðliga, og verður hetta skrivað sum eitt harðskapsmál, sigur vakthavandi á løgreglustøðini í Klaksvík.

Somuleiðis varð ein maður tikin inn á støðina í Klaksvík at sova nakrar tímar. Hann hevði gjørt eitt sindur um seg í býnum og trongdi til at koma niður á jørðina aftur.

Annars verður sagt av løgreglustøðini í Klaksvík, at hóast nógv fólk var úti, so hevur vikuskiftið sum heild verið friðarligt.

**-sae-**

## Pool kø á lofti í Havnar klubba

Leygarnáttina um eitt tíðina fóru tveir mans til hendurs við eitt pool borð í Havnar Klubba. Ilt kom í teir um eitt spæl, og annar tók køina og langaði hana í høvdið á hinum. Hesin fekk onkran smásnuddin av henni.

Rokið endaði tó friðarliga, tá løgreglan kom á staðið, og báðir menninir viðgingu teirra skuld í rokinum. Og so varð ikki gjørt meira burturúr tí.

Okkurt annað smávegis rok var eisini í býnum, men tað endaði alt í sátt og semju.

**-sae-**

Jólagávuna frá Televarpinum?

Televarpið byrjaði at senda fyri einum ári síðani og tí luta vit út eina stóra jólagávu - eitt LCD-sjónvarp, ein Televarpsmóttakara, hálvt árs kortleigu og hálvt árs Ælaboga-hald.

Um tú ert haldari hjá Televarpinum pr. 20. desember 2003 kanst tú luttaka við at skriva navn og bústað á Televarpsseðilin, klippa hann út og senda hann til Televarpið ella leggja hann í serligu postkassarnar á kendu Televarpssølustøðunum.



TV3, TV3+ og Viasat Sport á jólum? Keyp móttakara á kendu sølustøðunum fyri einans 1.695,- og síggj Televarpið ókeypis í desember.

team85

Gleð familjuna á jólum - 27 fjølbroyttar rásir til øll

Navn:
Bústaður:
Bygd/Býur:
Telefonnr.:

Send til: Televarpið, Postboks 27, FO-110 Tórshavn

Vit mugu hava Televarpsseðilin í seinasta lagi 20. desember 2003. Gev gætur, at bert haldarar hjá Televarpinum, ið eru haldarar áðrenn hendan dagin, kunnu luttaka. Til ber at senda fleiri seðlar. Drigið verður millum innkomnu seðlarnar 22. desember 2003, og lýst verður á www.televarp.fo

Tel 340340 · www.televarp.fo



Fyll Frælsi á telefonina á www.kall.fo
Galdandi allan desember mánað

Keyp fyri 50,- fá 70,- spar 40%
Keyp fyri 100,- fá 150,- spar 50%
Keyp fyri 250,- fá 400,- spar 60%

Ger so væl!
Allir FRÆLSI kundar fáa 150 ókeypis SMS-boð í desember mánaði

kall 20 20 20

SANSIR TEL 355355

949,-



NOKIA 3410
Mest selda frá Nokia
Sera brúkaravinarlig og við øllum hentleikum
Ymsar frontar, wap, spøl og mangt annað




team85

1995,-

SIEMENS MC60
Ein tann fremsta frá Siemens
Myndatól, litskýggi, polyfoniskir ringitónar
og fleiri ymsar frontar

FØROYA TELE
Skapið framtíðina saman við okkum

Alt tilhoyr í desembur
-15%



+298 303030 www.tele.fo

TELEBÚÐIN

Tilboðini eru galdandi so leingi, vøra er á goymslu. Fyrivarni verður tikið fyri prentvillum.

Tórshavn 317010 · Miðvágur 332000 · Klaksvík 404500 · Sandur 361000 · Tvøroyri 371000 · Saltangará 404400